# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## BARCA SKAL Á FØTUR

Úrslitini hjá europeisku meistarunum FC Barcelona hava verið misjøvn seinastu vikurnar, og nú Real Madrid andar Barca í nakkan í toppinum í La Liga, hevur Barca ikki ráð at snáva. Leygarkvøldið fáa teir vitjan av Sevilla, sum telist millum sterkastu feløgini í Spania, og nú skulu Messi og liðfelagarnir vísa, at teir ætla sær at vinna spanska gullið aftur í ár.

**BARCELONA-SEVILLA**
Rás 6 leygarkvøldið 16/1 kl. 21.00

## ANNA ROYNIR SEG

X-Factor kappingin er tann størsta og best umtókta av sínum slagi í Danmark. Í fjør vann føroyska Linda Andrews kappingina, og aftur í ár er føroysk songkvinna við. Hesaferð er tað unga Anna Nyaard, sum hevur vunnið ársins songrødd, ið tekur. Og forumtalan hjá DR gevur ábendingar um,a t Anna Nygaard fær góða móttøku í X-Factor fríggjakvøldið.

**X-FACTOR**
DR1 fríggjakvøldið 15/1 kl. 19.00



## JÓGVAN STÍLAR EFTIR FINALUNI

Leygarkvøldið verður annað av fýra innleiðandi kappingum í íslendska Tónleika Grand Prixnum. Ein av luttakarunum hetta kvøldið er klaksvíkingurin Jógvan Hansen. Málið hjá Jógvan er at enda millum tvey tey fremstu, og harvið vinna sær pláss í finaluni, sum verður fyrst í februar mánaði.

**ÍSLENDSKA EUROVISION**
SvF
leygarkvøldið 16/1
kl. 21.00



## SEMENT LEGGUR FRÁ LANDI

Tónleikakappingin Sement byrjar leygarkvøldið. Kapingin er skipað við tveimum innleiðandi umførum og einari finalu, og tað eru yngri bólkar, sum taka lut í talentkappingini, ið Margarinfabrikkin skipar fyri. Kappingin verður hildin í nýggju Perluni, og vinngurin, sum stendur uppá spæl, er studiotíð og festivalpallur at spæla á.

**TÓNLEIKAKAPPINGIN SEMENT**
Perlan
leygarkvøldið 16/1



## NINE Á HVÍTA TJALDINUM

Sangleikurin Nine var settur á Broadway í 1982 og gjørdist víðagitin. Nú er sangleikurin gjørdur til biograffilm við framúr góðum sjónleikarum. Daniel Day-Lewis vísur enn einaferð síni fantastisku evni, og afturat sær hevur hann eitt nú Judy Dench, Penelope Cruz og Kate Hudson. Filmurin snýr seg um leikstjóran Guido Contini, sum er í listarligari og persónligari kreppu.

**NINE**
Havnar Bio frá 14/1



## BISKOPPURIN VIÐ MEININGUM

- Er tað nakað, sum eitt samfelag ikki tolir, so eru tað ov nógv kenslusom og kreativ fólk. Hetta er eitt av sitatunum í bókini hjá danska biskoppinum Jan Lindhardt, sum er kendur fyri at hava nógvar meiningar. Í bókini greiðir hann erliga frá sínum uppvøkstri, tá ið hann millum annað stamaði so illa, at hann kláraði ikki at siga sítt egna navn, um hjúnarskilnaðin hjá sær og um trúnna á Gud.

**JAN LINDHARDT**
Der skal råbes
Kristeligt Dagblads Forlag

## GENTAN, SUM SPÆLDI VIÐ ELDIN

Annar partur í trírøðini um Lisbeth Salander fæst í komandi viku sum dvd-filmur. Røðin hevur verið sitt stórt hitt í biohøllunum, og nú kanst tú síggja filmin heima í stovuni, um tú vilt tað. Gentan, sum spældi við eld er spenningsfilmur, sum tekur við, har undanfarni filmurin – Mænd, der hader kvinder – slepti.

**PIGEN DER LEGEDE MED ILDEN**
DVD
frá týsdegnum 19/1

